## Poul Jákup Thomsen, orkesturformaður:

# Hetta var helst okkara bes

**– Vit hava sæð eina velduga stóra tónleikaliga menning í Føroyum, síðan vit fingu Musikkskúlan. Tað sigur eitt sindur, at vit hesaferð høvdu seks føroyingar við, sum ganga á konservatorii uttanlands. Eisini hetta er eitt úrslit av góðum tónleikaskúla í Føroyum, sigur Poul Jákup Thomsen, formaður í Føroya Symfoniorkestri**





*Hugtakandi var at hoyra og síggja Rúna Brattaberg syngja og framføra "Ol' Man River"*



NÝGGJÁRSKONSERT

*Orð: Vilmund Jacobsen*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Tey umleið 500 fólkini, sum vóru til Nýggjárskonsertina hjá Føroya Symfoniorkestri og Nýggjárskórinum sunnukvøldið, fingu eitt rættiligt tónleikaupplivilsi – við styrkini og dugnaskapinum hjá stóra symfoniorkestrinum, vøkru røddunum hjá kórinum og dýpdini hjá solistinum og úrmælinginum, Rúna Brattabergi.

*– Vit kenna tað sum okkara ábyrgd, at sangarar eisini fáa høvið at syngja saman við Føroya Symfoniorkestri, sigur Poul Jákup Thomsen, orkesturformaður*

Saman við einum væluppløgdum orkesturleiðara, Bernharði Wilkinson og einum væluppløgdum frásøgumanni, Ólavur Jakobsen, gekk alt upp á stás hetta kvøldið.

Norðurlandahúsið var at kalla fult av fólki, og spenningurin var stórur, tá ið fyrstu tónleikararnir, sum komu inn á stóra pallin, byrjaðu at blæsa í síni ljóðføri og spæla á sínar steingir.

### Eydnaðist væl

Poul Jákup Thomsen, sum hevur verið formaður fyri Føroya Symfoniorkestri seinastu 12 árini, heldur, at konsertin hesaferð helst er tann besta, sum orkestrið nakrantíð hevur havt.

– Eg haldi, at tiltakið eydnaðist stak væl, sigur hann.

Hóast fleiri av tónleikaverkunum hesaferð vóru rættiliga torfør, vóru nakrir av musikkskúlanæmingunum aftur hesaferð millum tey umleið seksti, sum mannaðu orkestrið.

– Vit hava sæð eina velduga stóra tónleikaliga menning í Føroyum, síðan vit fingu Musikkskúlan. Haraftrat sigur tað nakað, at vit hesaferð høvdu seks føroyingar við, sum ganga á konservatorii uttanlands. Eisini hetta er eitt úrslit av einum góðum tónleikaskúla í Føroyum.

Poul Jákup visir á, at tá ið familjukonsertirnar vóru í Runavík og í Havn í desember, vóru umleið 15 næmingar, sum fáa